

# Teir tóku land 6
## - føroyingar í Grønlandi

Føroyingar í Grønlandi vágaðu lívið. Í 1963 stóðu 24 lík undir børu samstundis í Føroyingahavnini, tá týski trolarin München sakk á veg heim við fullari last. Sama árið fór Blikur at leka í ísinum á Kappanum, og 40 føroyingar noyddust í bjargingabátarnar. Hann sakk, men ein týskur trolari tók menninar upp. Manningin noyddist eisini av skonnartini »Tinganesi«, sum rendi á ein flúr og sakk. Tíbetur kom Vesturvón teimum til hjálpar.




Sætta bókin í røðini Teir tóku land eftir Jógvan Arge ger burturúr sekstiárunum, tá fleiri túsund føroyingar fiskaðu í Grønlandi. Nordafar bygdi framkomið flakavirki í Føroyingahavnini, menn settu seg niður í Grátufjørðinum, og føroyingar bygdu eisini útróðrarhavn á Eggersoy, har sjálvur Kap Farvel er.
Í bókini er yvirlit yvir føroyskar útróðrarmenn í Grønlandi tey árini, tá virksemið var í hæddini. Bókin er 208 síður, prýdd við forvitnisligum myndum, tekningum og kortum

299,-

Jógvan Arge



# HOTEL NORÐ HARUSKJÓTING

**Um viðrar skipa vit fyri haruskjóting, vikuskiftini 10. nov., 24. nov. og 1. des. 2001**

**Kostnaður kr. 1.950,- pr. persón.**

**Við í prísinum:**
**Kaffi og rundstykki við komu leygarmorgunin kl 9.00.**
**Matpakki.**
**Skjóting 5-7 tímar við guide.**
**Festdøgurði um kvøldið.**
**Gisting v/morgunmati leygarnátt-sunnudag.**
**Ein má sjálvur hava byrsu og patrónir við.**

**18 ára aldursmark.**

**Bólkar hava eisini møguleika fyri at bíleggja aðrar dagar.**



**Hotel Norð**



Tel 451244 Fax 451245 FO 750 Viðareiði



# Umbýti av húsum

Eldri hús í miðbýnum í Havn í tveimum hæddum, v/ lítlari íbúð í kjallaranum, ynskjast í býti við størri hús í Havn ella nærhendis.

**Áhugaði ringið tlf. 321340**



# Leiðari søkist

Vit sóknast eftir leiðara til handil okkara at byrja skjótast tilber.

Má vera útbúgvin innan keypmansyrkið, vera røkin, álítandi, hava góð samstarvsevni og má kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Góð løn verður latin!

Skrivlig umsókn við avritum av lærubrævi og evt. viðmælum verður at senda til



**BAKARÍIÐ**
**Mylnan**
Postboks 3334
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 8. nov. 2001.

Um nærri upplýsingar ynskjast kann ringjast til Per Poulsen, tlf. 314456 – 214456.





# Handverkarar

Søkt verður eftir dugnaligum handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrkið.

Ring á tlf. 211071

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo



# Fólk søkist

Fókl yvir 18 ár søkist til grillbar. Skiftandi vaktir.

**Grill 2000**
Ring tlf. 213388



# Havnar Tennisfelag

Í vetur skipar Tennisfelagið fyri innandura minitennis í ítróttarhøllini á Nabb sunnumorgun frá kl. 9.30-11.00. Byrjað verður nú sunnumorgunin 4. november.



# Grundstykki í Trongisvági

Grundstykkið matr. nr. 144 BE, 844 $m^2$, bíliga til sølu.

**Tlf. 372166**



VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiðki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum. Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

ROBETO GSSG v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311800



# Vikuskifti

Nr. 99 • leygardagur • 3. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo


## Tað góða sjónvarpið og Føroyar

Kim Simonsen skrivar kronikk um, hví sjónvarpstíðini ikki eru gott sjónvarp

**Lesið á síðu 6 og 7**





## Onkur skal doyggja um eg skal liva

- At verða skryktur av skipsdekki inn á sjúkrahús og fáa boð um, at eg einki kann gera uttan at bíða eftir einum nýggjum lunga, er ikki hugaligt, sigur Jákup Oluf Breiðaskarð úr Fuglafirði

**Lesið á síðu 4 og 5**




## Janus á donskum

- Janus Djurhuus er avgjørt áhugaverdur hjá øðrum enn føroyingum at lesa um, sigur Hanus Kamban, rithøvundur, nú danska útgávan um Janus Djurhuus er komin út

**Lesið á síðu 8**

# Gera jólaprýði alt árið

**Krambúðin hjá Verkstaðnum Vón á Argjum er heldur tómlig nú. Hetta kemst av tí, at nú nærkast jólum, og gjørt verður klárt til stóru jólasøluna, sum er ein afturvendandi siður hvørt ár**



*Brúkararnir á Verkstaðnum Vón sita her og gera jólalutir til vælumtóktu jólasøluna*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

VERKSTAÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Teir 40 brúkararnir á Verkstaðnum Vón eru nú rættiliga farnir í gongd við at gera jólaprýði til jólasøluna, sum fer at byrja í næstum.

Tað er ikki bert nú tað nærkast jólum, at brúkararnir sita og gera jólaprýði. Nei, jólaprýðið verður gjørt alt árið runt, tí annars er ongin møguleiki fyri at nøkta eftirspurningin.

- Jólasølan er ógvuliga væl umtókt, og fólk síggja fram til jólasøluna hjá verkstaðnum, sigur Maud Wang Hansen, leiðari á Verkstaðnum Vón.

- Til jólasøluna gera vit jólaprýði og jólalutir, sum ikki kunnu keypast í vanligum handlum. Alt jólaprýði, sum vit selja, er hondgjørt. Serliga eru tað nissurnar, ið eru væl umtóktar. Nissur vera gjørdar í øllum støddum, og eru tað eisini tær, ið eru mest eftirspurdar.

Umframt jólasøluna hevur krambúðin hjá Verkstaðnum Vón opið hvønn dag. Tá er tað fyrst og fremst seymideildin á verkstaðnum, ið ger lutirnar, sum verða seldir. Eisini gera tey, ið hava evning, lutir sum til dømis upphang, leirlutir, gandadeiggj og gipslutir.

Pappírsdeildin plagar at gera kort. Bæði bræv- og gávukort, meðan timburdeildin stendur fyri vøggum og dukkusongum.

Tá jólasølan stendur fyri durum eru tað allar deildirnar, seymi-, evning-, timbur- og pappírsdeildin, ið framleiða lutir til krambúðina. Eisini plagar kantinan at hava ymiskan heimabakstur til sølu meðan jólasølan er.

Jólasøla er jú ikki alt árið runt. Restina av árinum eru tað serliga brúkslutir til heimið, ið verða seldir í krambúðini. Grýtulappar, te-hettur, fyriklæði og líknandi. Handkløð verða eisini áseymaði av brúkarunum.

- Ofta eru tað nøvn á børnum, ið vit seyma á handkløðini, greiðir Maud Wang Hansen frá.

- Ella til dømis um eitt barn spælir fótbólt, so seyma vit ein fótbólt á, ella kanska ein svimjara.

Eisini stendur Verkstaðið Vón fyri at framleiða dukkuklæðir til eitt nú Baby Born dukkurnar og smábarnalutir, sum til dømis teppir og seingjarklæðir.

Um fólk hava serlig ynski til lutir, ið skulu gerast, kunnu tey fáa ynskini uppfylt frá verkstaðnum, um møguleiki er fyri at framleiða tey har.

Peningurin, sum kemur inn frá søluni í krambúðini, fer til rakstur, umframt ein góðan og væl uppibornan jóladøgurða fyri arbeiðsfólk og brúkarar.